# Kjak



**Sólvit Simonsen**
*Sandur*

## Premieraður fyri at fara fallitt

Táið eg var í góðum árum, var eg við til at keypa eitt skip.

Eg átti ongar pengar og tók lán upp á mína aktiu í skipinum. Vit høvdu skipið í nøkur ár, so fór tað undir hamaran. Hesaferð slapp eg við bert at blíva av við partapeningin.

Somuleiðis havi eg sett nógvar pengar í flakavirkið í bygdini, har slapp eg somuleiðis, við at missa partapeningin.

Síðan var eg við til at keypa ein deksbát, nevndur, Tindur. Síðan var ynski um at keypa størri bát, og høvdu vit hann í nøkur ár. Síðan var aftur ynski um at keypa ein størri trolbát. Hettar bleiv gjørt. Tíverri fekk Tindur eisini ta lagnu at fara fallitt.

Í hesum føri blivu vit so avgjørt ikki premieraðir, eg fekk beint uppundir at blíva pensiónistur, knívin á barkan frá bankanum. - Betal 200.000! - og onki meira roks. Soleiðis gekk mítt fallitt, sjálvt um eg aldrin fekk eitt oyra burturúr mínari íløgu.

Rætt skal vera rætt, eg fekk onkuntíð til knettir frá teimum.

Eg við mínum rufluta heila noyðist at tonkja, hvussu leingi hava hesir stjórar havt um at hugsa um, nær teir skulu koyra bankan á heysin, fyri at koma framat hesum pengunum.

Men eitt kunnu vit vera samd í, at mátarnir at fara fallitt uppá eru fleiri.

Eg minnist, at Sjóvinnubankin fór fallitt, minnist meg rætt var í 1952 ella 1953, og tann stjórin, ið tá sat, bleiv ikki **premieraður** fyri fallittið.



**Zakarias Wang**

## Rætta løtan

Nú eru vit illa fyri.

Heimskreppan hevur rakt okkum, og danska fíggjareftirlitið er farið til verka. Hetta hava vit sæð fyrr, og tá lá alt okkara land í skeljasori eftir at teir høvdu herjað. Teir settu peningastovnunum so stór krøv til avskrivingar, at størsta inntøkan hjá hesum stovnum í fleiri ár vóru afturíkomnar avskrivingar. Men vit mistu túsundtals av fólkum okkara, sum svárur saknur er í nú.

Tað sum nú er at gera, er at løgtingið kemur saman á fund og samtykkir, at hetta er nakað, sum vit ikki vilja lata okkum lynda enn einaferð, og at vit tí nú loysa Føroyar frá Danmarkar ríki.

Ongantíð hevur tað ligið so væl fyri sum nú.

Oddamenninir í stjórnunum í Føroyum og Danmørk eru í sama politiska flokki. Teir kunnu tí sum felagar koma til sættis um, á hvønn hátt vit kunnu samstarva í sátt og semju í ókomnum tíðum til frama fyri báðar partar.




Cosméto
vakurleiki og vælvera

Tilboð í oktober:

- Uppfrískandi andlitsviðgerð, **bert kr. 199,-**
- Voksa leggir, **bert kr. 130,-**
- Hot stone / vøddamýking (30 min.) **bert kr. 250,-**

*Vakurleiki og vælvera*

... les meir á www.cosmeto.fo


### OKTOBER KAPPINGIN

Hvønn dag í oktober mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnina innan fríggjadagin 5. november 2010 kl. 10.00 og merki brævbjálvan **»Sudoku«**.

**Drigið verður í viku 45.**

Fyri at vera við í kappingini, skal øll uppgávan verða loyst.

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | 1 | | 9 | | 8 | | 6 |
| | | | | | 6 | | 4 | |
| 8 | | 9 | | 1 | | 2 | | |
| | | | 7 | | | | 1 | |
| 2 | | | | | | | | 8 |
| | 5 | | | | 9 | | | |
| | | 6 | | 5 | | 7 | | 2 |
| | 2 | | 3 | | | | | |
| 4 | | 8 | | 7 | | 1 | | |

Cosméto
vakurleiki og vælvera
www.cosmeto.fo · Tel. 31 80 70

Navn: ____________

Bústaður: ____________

Telefon: ____________

Sendið til: Sosialin · Boks 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan »Sudoku«

***Vinningurin hesaferð er frá Cosmeto***

SUDOKU


*Restylane · Botox · Permanent make-up · Peeling*

*Lesa meira á heimasíðuni www.cosmeto.fo*

Sosialurin